# Uppsettir nólsoyingar



*Við einum sigri á 2.000 metrum í dag, kunnu nólsoyingar leggja seg tvey stig fram um Havnarbátin – ella umvent. Men óansæð hvat, so fellur avgerðin um føroyameistaraheitið á ólavsøku*

**Spenningurin er øgiligur í tíggjumannafarsróðrinum. Havnarbáturin og Nólsoyingurin liggja javnir í stigum í kappingini um at gerast føroyameistarar. Nicolaj Falck er bátsformaður á Nólsoyingi, og hann sigur, at teir gleða seg til róðurin í Sørvági**

KAPPRÓÐUR
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Vónirnar hjá manningini umborð á Nólsoyingi til róðurin í dag, eru avbera góðar. Tað sigur bátsformaðurin, Nicolaj Falck. Róð verður á 2.000 metrum, og tað sær Nicolaj sum ein fyrimun, tí teir eru sterkir á 2.000 metrum.

Hann kemur eitt sindur inn á munin ímillum at rógva 2.000 og 1.000 metrar.

– Á 1.000 metrum ber næstan ikki til at vera taktiskur, tað er jú nærum alt ein spurtur, sum tað er, greiðir hann frá. Hann heldur fram, at tá róð verður á 2.000 metrum, kemur tað ikki skjótt panikkur í manningina, tí hóast man kann liggja illa fyri, tá 1.000 metrar eru farnir afturum, so ber til at heinta nógv innaftur.

– Á 1.000 metrum ræður sanniliga um at halda høvdið kalt. Um starturin kiksar, so kann tað vera nóg mikið til, at ein manning ongantíð kemur fyri seg undir róðrinum, og tískil kann missa týdningarmikil stig, sigur bátsformaðurin.

Nólsoyingur hevur vunnið tveir róðrar, Havnarbáturin tveir og Vágbingur ein. Tað er so tilvildarligt, at á 2.000 metrum var munurin tann sami millum bátarnar. Tað vil siga, at á eystanstevnu var Havnarbáturin fimm sekund framman fyri Nólsoying og umvent, tá Nólsoyingur vann á sundalagsstevnu.

Síðani hana hevur verið róð á 1.000 metrum, og tá hevur munurin so at siga verið lítil og ongin millum teir fremstu bátarnar.

## Bilsnir

Nicloaj dylir ikki fyri, at teir gjørdust rættuliga bilsnir til seinasta róðurin, tá harðasti kappingarneytin, sum lá fýra stig frammanfyri, endaði á einum fjórða plássi.

– Vit høvdu bara vónað, at vit fóru at vinna róðurin, so vit kundu koma tvey stig nærri teimum. So vit vórðu rættuliga bilsnir, men sjálvandi var hatta avbera gott. Vit høvdu so í øllum førum ikki væntað, at tað fór at fella so nógv til okkara fyrimunar, sigur Nicolaj, sum eisini heldur, at tað er nógv stuttligari at rógva, tá kappingin er hørð.

– Ikki fyri at koyra niður upp á nakað, men tak til dømis árini síðst í nítiárunum, tá Eysturoyingur var suverenur. Tað var onki spennandi og av tí sama ikki líka stuttligt, sum nú, heldur hann fyri.

Nicolaj ivast ikki í, at tað verður ein øgiligur spenningur undan róðrinum í dag, og ikki minni til ólavsøkuna.

– Tíggjumannfarsróðurin verður avgjørdur á ólavsøku, óansæð hvat, sigur ein ivaleysur Nicolaj Falck, bátsformaður á Nólsoyingi.

**Fimmmannafør, dreingir**
1 Drekin
2 Royndin Fríða
3 Kollur 1G
4 Firvaldur
5 Tekla
6 Havfrúgvin 1G
7 Blikur
8 Spógvin
9 Fípan Fagra
10 Tjaldrið 1G
11 Svanur
12 Sílið 1G

**Seksmannafør, kvinnur**
1 Riddarin
2 Sundabáturin
3 Gongurolvur
4 Lómur
5 Jarnbardur
6 Páll Fangi
7 Sølmundur
8 Víkingur

**Fimmmannafør, gentur**
1 Dúgvan
2 Spógvin
3 Falkur
4 Fípan Fagra
5 Firvaldur 1G
6 Havfrúgvin 1G
7 Blikur
8 Sílið
9 Junkarin
10 Frúgvin
11 Drekin
12 Ørnin
13 Tjaldrið
14 Tekla

**Seksmannafør, menn**
1 Sandingur
2 Lómur
3 Hósvíkingur
4 Strálan
5 Jarnbardur
6 Sundabáturin
7 Gongurolvur 1G
8 Víkingur
9 Sølmundur 1G
10 Hvessingur
11 Smyril

**Áttamannafør**
1 Miðvingur 1G
2 Ørvur
3 Nevið Reyða
4 Argjabáturin
5 Kvívíkingur
6 Knørrur
7 Tofta Regin

**Tíggjumannafør**
1 Skálabáturin
2 Havnarbáturin 1G
3 Eysturoyingur
4 Nólsoyingurin
5 Vágbingur
6 Vestmenningur 1G
7 Hoyvíkingur 1G

**Barnaróður, gentur**
1 Dúgvan
2 Tekla
3 Havfrúgvin
4 Ørnin
5 Royndin Fríða
6 Fípan Fagra
7 Spógvin

**Barnaróður, dreingir**
1 Firvaldur
2 Royndin Fríða
3 Fípan Fagra
4 Blikur
5 Junkarin
6 Hulda




Vikuskifti
Nr. 130 • leygardagur • 10. juli 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

ARoS nýggja altjóða listasavnið í Århus



s. 4–5



*Mynd: Rúnar Reistrup*

# Hermannalegan í býnum

## Ein lítil kirkjugarður ímillum stórveldi

*Firouz Gaini*

Danski høvuðsstaðurin hýsir nógvum søguligum kirkjugørðum, har ið kend og ókend úr farnum tíðum hava funnið síðsta hvíldarstað sín. Ein tann størsti og kendasti, Vestre Kirkegård, er býttur upp í øki, har ið føroyingar deyðir í Danmark eiga eitt. Ein annar stórur kirkjugarður í Keypmannahavn er Assistens Kirkegård, Nørrebro, ið skapar eitt tiltrongt andarúm í sera tættbygdum og slitnum býarparti. Av øðrum kirkjugørðum kann eg nevna Frederiksberg Kirkegård, Holmens Kirkegård og Garnisons Kirkegård, har ið síðstnevndi liggur ímillum fleiri stórar útlendskar sendistovur, tætt við tokstøðina Østerport.

Undir kalda krígnum var Garnisons Kirkegård tað einasta, ið skilti sendistovurnar hjá Sovjetsamveldinum og USA sundur. Umleið fimti metrar. Tó fekk hesin vakri gamli hvíldarstaðurin hjá dønum frið frá stórveldunum í eystri og vestri. So er ikki longur. Nú eru sjálvt tey deyðu ein hóttan ímóti Bush.

Frá Østerport til Sortedams Sø, einar 200 metrar, gongur ein óvanliga breið gøta nevnd Dag Hammarskjölds Allé, og her liggur tann amerikanska sendistovan í Danmark. Hon er í einum betongbygningi í trimum hæddum, væl vard úr øllum ættum. Ómetaliga væl vard má sigast. Og aftanfyri liggur so Garnisons Kirkegård, ið teir russisku og bretsku sendimenninir eisini hava útsýni yvir. Íbúgvarnir í grannalagnum, á Østerbro fara ofta inn í kirkjugarðin at ganga ein túr; fleiri inngongdir eru, tríggjar haldi eg, og sostatt kann ein eisini ganga ígjøgnum kirkjugarðin. Garnisons Kirkegård minnir um aðrar gamlar kirkjugarðar í býnum; har er grønt, friðarligt og ruddiligt. Á gravsteinum í ymsum støddum og sniðum standa nøvn og árstøl, og viðhvørt kennist ein við navnið, sum er høgt í steinin. Hinumegin múrarnar er nógv broytt síðan x generalur andaðist, men her, inni í kirkjugarðinum, er dámurin tann sami. Einans árstíðirnar skifta, og tað í síni vanligu gongd.

Meðan tey deyðu í kirkjugarðinum hvíla, so broytist støðan í heiminum, og menninir og kvinnurnar, sum arbeiða í teimum stóru bygningum, ið kasta sínar skuggar yvir gravirnar í Garnisons, hava ein týðandi leiklut í hesum stóra spæli um valdið á bláu klótuni Tellus. Undir kalda krígnum vóru gravirnar markið ímillum tveir blokkar: eystur og vestur, kommunismu og kapitalismu. Njósnarar lógu og lúrdu aftan fyri steinarnar og lurtitól vórðu sett upp allastaðni. Múrurin í Berlin fall, Týskland varð sameint, og Sovjetsamveldið skrædnaði, men Garnisons Kirkegård fekk frið. Tey deyðu kunnu væl ikki gera við at tey livandi liggja og stríðast um ymsar ideologiir? Tey hava havt sína klótu við sínum trupulleikum, men nú eru tey farin, friðað og kunnu sostatt ikki lastast fyri nakað. Men tá ið ein múrur verður rivin niður, verður annar reistur. Hyggið at heiminum! Og í 2003 hendi so tað, at ein múrur eisini varð reistur inni í Garnisons Kirkegård.

Fólk skiltu ikki reiðiliga, hvat ið gekk fyri seg, tá ið menn ein dagin fóru at grava holur í einum horni í kirkjugarðinum. Tað sá út, sum um ein veit skuldi gravast ímillum nakrar stakkals avbyrgdar gravsteinar og restina av kirkjugarðinum. Men hví? Áðrenn nakar visti av nøkrum, vóru metallpelar, umleið ein metur til hæddar, komnir upp í tí økinum av kirkjugarðinum, sum liggur tættast upp at amerikonsku sendistovuni. Hægst ein metur er ímillum hesar pelarnar, ið hava oyðilagt kirkjugarðin. Talan er um herverk í amerikonsku anti-terrorismunnar navni. Hóast teir donsku kirkjumyndugleikarnir vóru ímóti hesari verjuskipanini hjá sendistovuni, so góvu teir skarvin yvir, tá ið Washington vísti vøddar. Nú mugu tey deyðu í Garnisons Kirkegård eisini finna seg í at fáa harraboð úr Washington. Amerikanarar hava reist sínar egnu metall-gravsteinar, kaldir og uttan navn og árstal, sum skulu verja USA frá álopum frá teimum deyðu. Nakrir stakkals gravsteinar eru fangaðir innan fyri metallpelarnar, á amerikanskum øki, og tað munnu vera fá, sum hætta sær yvir til hesar steinarnar - uttan eftirkomararnir.

Um tann amerikanska sendistovan hevði ligið uttan fyri býin, ella á eini lítlari oyggj, til dømis Saltholmen í Oyrasundi, so hevði verið léttari at vart borgina, samstundis sum kirkjugarðar høvdu fingið frið. Eftir at pelarnir komu upp, er blivið veruliga kalt og deydligt í Garnisons Kirkegård. Nógv færri tora at fara inn. Og hvør vil órógva sendistovuna og kanska verða mistikin fyri at stuðla terror? Hvat nú um ein ikki hevur "ørindir" í kirkjugarðinum? Um ein ikki hevur skyldfólk undir moldini?

Danski mentamaðurin Victor Borge sáli hevur óivað mangan gingið í Garnisons Kirkegård, tí hann var føddur í Classensgade 40, ið einans er eitt hanagleiv frá kirkjugarðinum. Victor hevði humor; hann visti hvussu ein kann bróta niður múrar ímillum menniskju; hann hevði nokk vent seg í grøvini, um hann hevði sæð metallpelarnar - ella bara flent. Sum tað stendur á minningartalvuni við inngongdina til Classensgade 40:

*Den korteste vej mellem to*
*mennesker er smilet*
*Når vi smiler bliver livet lettere.*